

# Tróndur tekur gullið við sær

Tróndur Kragesten verður ikki við, tá Neistin í komandi kappingarári fer at royna at endurvinna greipuna. Hann fer til Danmarkar í lestrarørindum og fer tí av landinum við gullinum í viðførinum.

– Men eg ivist ikki í, at Neistin fer at stríðast fyri at endurvinna steypakappingina og landskappingina, sigur Tróndur Kragesten.

Men hví hevur Neistin verið einaráðandi í hesum kappingarárinum?

– Tað hevur verið ein seriøsur bólkur av fólki aftanfyri leikarahópin, sum hevur gjørt eitt megnar arbeiði. Leikararnir kunnu sjálvsagt taka ábyrgdina, men leiðslan og ábyrgdarfólkini eiga eitt stórt herðaklapp fyri sítt avrik, sigur Tróndur Kragesten, sum ikki metir, at tað var óneyðugt at spæla finalurnar. Tað er bara til frama fyri hondbóltin, sigur hann.

– Vit vistu undan kappingarbyrjan, at føroyameistaraheitið skuldi avgerast við tveimum finalum. Vit hugsaðu um ræðumyndina, at vit kundu tapa. Men tíbetur vunnu vit, sigur Tróndur Kragesteen.

**STÓR FRØÐI**

*Frøin var ikki at fara skeivur av páskaaftan, tá Neistin vann føroyameistaraheitið og tí er greipuvinnari eftir eitt sera væleydnað kappingarár hjá teimum bláu*

*Mynd: Álvur Haraldsen*





## FAKTA um finalurnar

**Kyndil-Neistin 25-30** (12-15)
Dómarar: Rúni Mohr & Ragnar Simonsen

**Kyndil:** Josef Abrahamsen 7, Bárður Johannesen 5, Høgni Klein 4, Tummas Pauli Hanusarsson 3, Janus Einar Sørensen 2, Hans Áki Dal-Christiansen 2, Julian Johansen 1
**Neistin:** Finnur Hansson 7, Jugoslav Djumic 5, Tróndur Kragesten 5, David Edvardsen 4, Sjúrður Thomassen 3, Ingi Olsen 3, Heini Hanusarson 3

**Neistin-Kyndil 33-25** (15-12)
Dómarar: Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen

**Neistin:** Finnur Hansson 8, David Edvardsen 7, Heini Hanusarson 6, Jugoslav Djumic 5, Sjúrður Thomassen 3, Ingi Olsen 2, Tróndur Kragesteen 1, Jens Mohr 1
**Kyndil:** Josef Abrahamsen 6, Hans Áki Dal-Christiansen 5, Bárður Johannesen 4, Tummas Pauli Hanusarson 4, Janus Einar Sørensen 2, Høgni Klein 2, Jógvan Skeel Nolsøe 1, Rani Ellingsgaard 1

# Neistin fyrireikar seg til framtíðina

Føroyameistarar í 2008. Steypavinnarar í 2009. Greipuvinnarar í 2010.

Neistin hevur myndað føroyska hondbólt seinastu trý árini. Besta mansliðið hevur vunnið fýra gullheiðursmerki seinastu trý árini. Tað kann væl lýsast sum eitt bragd.

Men nú fyrireika greipuvinnararnir seg til framtíðina. Longu í 2002 vóru fyrstu stigini tikin at byggja egna ítróttarhøll, og góð átta ár seinni varð farið undir arbeiðið við Landavegin.

Jógvan Arge, formaður í mentamálanevndini hjá Tórshavnar Býra, rósar eisini stóra arbeiðinum hjá felagnum í einum blaði hjá Neistanum, sum varð borið út í hvørt heim í farnu viku.

– Tað er óhoyrt í okkara tíð, at eitt ítróttarfelag av sínum eintingum kemur við fleiri miljónum til eina slíka bygging, og ikki minni áhugavert er tað, at felagið er hugað at byggja í vesturbýnum, har ítróttarhús vanta, skrivar Jógvan Arge.

Neistin letur slakar sjey milliónir krónur til hallararbeiði. Tórshavnar kommuna hevur játtað 7,25 milliónir til arbeiðið. Høllin kostar í alt 22 milliónir krónur, og seinastu milliónirnar eru framvegis ikki komin til høldar, skrivar Neistablaðið.